## Ein vanlukka fyri samfelagið

Tað er ein vanlukka fyri føroyska samfelagið, at vit ikki hava lurtað nóg væl eftir lívfrøðiligu tilráðingunum um, hvussu nógv vit skulu fiska um árið.
Tað halda Tjóðveldi og Miðflokkurin, sum nú vilja hava løgtingið at taka um endan.
Avleiðingin er, at marknaðurin vil ikki betala fullan prís fyri okkara útflutning.
Tí leggja teir báðir flokkarnir nú uppskot fyri Løgtingi um at samtykkja, at landsstýri beinanvegin skal leggja neyðugar lógarbroytingar fyri Løgtingið, so at allur føroyskur fiskiskapur verður lívfrøðiliga burðardyggur eftir altjóða viðurkendum ásetingum.
Teir báðir staðfesta, at seinru árini hevur rákið í altjóða samfelagnum verið, at brúkarar gerast alsamt meiri tilvitaðir um, hvussu livandi tilfeingið í havinum verður røkt.
Nú er veru¬leikin tann, at Føroyar verða ikki mettar at fiska týðandi fiskasløg burðardygt, og hevur ein avleiðingin verið, at marknaðir okkara hava reagerað ímóti gongdini og væntast kann, at trupulleikin bara veksur, um vend ikki kemur í rikna fiskivinnupolitikkin.
- Týðandi partar av flotanum megna ikki at svara hvørjum sítt, fiskimenninir fækkast í tali, arbeiðsloysið veksur og landskassahallið hevur verið og er metstórt.
- Mangt bendir á, at skeiv politisk stýring kostar okkum á hvørjum ári milliardavirði í útflutningi og verður kósin ikki broytt beinanvegin, fara vit ikki at megna at halda uppi einum nøktandi vælferðarsamfelagi.
- Neyðugt er tískil at fáa skil á stovsnrøktini soleiðis, at serliga toska- og hýsustovnarnir koma aftur í eina burðardygga legu, siga Miðflokkurin og Tjóðveldi.

# Knockabout




Flestu kandidatarnir eru útslignir áðrenn teir koma í ringin

## Í MORGIN

6/9 °C



9-14 m/s 9-14 m/s

Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottaar. Hitin millum 6 og 9 stig.

## FRÍGGJADAGIN

3/6 °C



7-12 m/s 10-15 m/s

**Veðrið fríggjadagin:**
Um morgunin upp í hvassan vind av vestri og ælingur, men annars andøvsgul upp í ein strík av útnyrðingi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin fellur niður í 3 og 6 stig.

## LEYGARDAGIN

3/6 °C



1-6 m/s 5-10 m/s

**Veðrið leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul av útnyrðingi, seinnapartin lot av ymsum ættum. Yvirhøvur turt og sólglottar og hitin millum 3 og 6 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Sunnudagin andøvsgul upp í ein strúk av útsynningi. mánadagin veksur hann vindin upp í skrið. Sunnudagin yvirhøvur turt, men mánadagin ælingur. Hitint millum 3 og 7 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




**Síðstu nátt:**
Eitt stormlágtrýst, 982 hPa. skamt eystanfyri Ísland fer skjótt í landnyrðing og dýpist nakað. Brúgvalagið eystan fyri Førtoyar fer eystureftir.




**Komandi nátt:**
Lágtrýstið yvir Grønlandsfjørðinum fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani verður í høvuðsheitum norðan fyri Føroyar.

## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 132 mm

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Nuuk** | -9 | **Tromsø** | -1 | **Moskva** | -13 | **Athen** | 14 |
| **Reykjavík** | 8 | **Bergen** | -2 | **Berlin** | -6 | **Beijing** | 11 |
| **Tórshavn** | 7 | **Oslo** | -9 | **Paris** | 3 | **New Dehli** | 20 |
| **Lerwick** | 4 | **Stokkhólm** | -6 | **Madrid** | 15 | **Bangkok** | 32 |
| **Aberdeen** | 7 | **Keypmannah.** | -4 | **Róm** | 11 | **Sydney** | -- |
| **London** | 8 | **Helsinki** | -19 | **Malorca** | 15 | **New York** | 2 |



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

## VESTFALLSKYRRINDI

24. februar Seinna kvarter
4. mars Tendring
6. mars Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2011

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2. mars | 04:56 | 17:17 | 03:56 | 16:17 | 04:11 | 16:32 | 06:56 | 19:17 | 07:56 | 20:17 | 03:11 | 15:32 | 02:11 | 14:32 | 05:11 | 17:32 | 06:11 | 18:32 | 04:41 | 17:02 | 05:56 | 18:17 |
| 3. mars | 05:38 | 17:59 | 04:38 | 16:59 | 04:53 | 17:14 | 07:38 | 19:59 | 08:38 | 20:59 | 03:53 | 16:14 | 02:53 | 15:14 | 05:53 | 18:14 | 06:53 | 19:14 | 05:23 | 17:44 | 06:38 | 18:59 |
| 4. mars | 06:19 | 18:39 | 05:19 | 17:39 | 05:34 | 17:54 | 08:19 | 20:39 | 09:19 | 21:39 | 04:34 | 16:54 | 03:34 | 15:54 | 06:34 | 18:54 | 07:34 | 19:54 | 06:04 | 18:24 | 07:19 | 19:39 |
| 5. mars | 06:58 | 19:17 | 05:58 | 18:17 | 06:13 | 18:32 | 08:58 | 21:17 | 09:58 | 22:17 | 05:13 | 17:32 | 04:13 | 16:32 | 07:13 | 19:32 | 08:13 | 20:32 | 06:43 | 19:02 | 07:58 | 20:17 |
| 6. mars | 07:36 | 19:55 | 06:36 | 18:55 | 06:51 | 19:10 | 09:36 | 21:55 | 10:36 | 22:55 | 05:51 | 18:10 | 04:51 | 17:10 | 07:51 | 20:10 | 08:51 | 21:10 | 07:21 | 19:40 | 08:36 | 20:55 |